LØGTINGIÐ

**Dropar, ið muna**

Ein stórur steinur stendur í fjøruni. Miðskeiðis omaná er eitt dýpi, ein kulla. Tann fyrsti dropin, sum rakti steinin, gjørdi ongan mun; tann næsti lítlan, og tí triðja sást einki eftir. Men, tá droparnir blivu nóg nógvir; tá kinetiska orkan frá dropum í ferð niður á steinin savnaðist, og droparnir gjørdust so mangir, at ikki bar til at telja teir, tá tók mjúka kullan í steininum at dýpast. Við óvarnandi spakuligari ferð gjørdu droparnir sprungur í steinin. Tá sólin ein dag loksins skein beint á steinin, sóust djúpar rivur, sum at enda kloyvdu steinin.

Tað er so lætt at hugsa: Tað, sum eg geri, ger ongan mun. At savnast her í Løkshøll til eina friðarráðstevnu, í einum heimi, sum er farin um tvøran og sum tægist sundur av mest ótemjandi og oyðileggjandi megini, sum er til - av harðskapi og kríggi - kann tykjast nyttuleyst. Tí hvønn munin kunnu vit føroyingar gera í tí at skapa frið?
Fremsta fyritreytin fyri at skapa frið er at trúgva uppá, at friður ber til. Fremsta fyritreytin fyri at ávirka er at trúgva uppá, at tín ávirkan kann gera mun.

Og jú.

Tað er ikki støddin á landinum, sum ger av, hvørt tú hevur megina at geva títt íkast til frið. Tað er andsmegin og viljin. Tað er víðskygni, og tað krevur, at onnur síggja teg - og hava virðing fyri tær.

Júst støddin á landinum verður ofta mett sum treyt fyri ávirkan. Tess størri land, tess størri vald.
Meðan møguleikarnir hjá smáríkjum at gera seg galdandi, og harvið at hava eina rødd á altjóða pallinum, sostatt áttu at verið avmarkaðir, hevur veruleikin víst nakað heilt annað. Við samráðingarsnildum, og við sínum trúvirði, hava júst smáríkir víst seg at havt nógv at siga.

Í 1993 fekk táverandi norski uttanríkisráðharrin, Johan Jørgen Holst, sáli, ein avgerandi leiklut í stríðnum ímillum PLO og Ísrael. Tá formellu fundirnir, har størri lond gjørdu royndir at fáa semju í lag, ikki eydnaðust, fekk Noreg litið upp í hendurnar at royna at skapa samband á partleysari grund. Á loyniligum staði, í vøkru norsku náttúruni og uttan ávirkan ella trýst uttanífrá, hittust stríðandi partarnir. Við hesum bleiv fyrra Oslo-avtalan undirskrivað. Ein avtala, har deyðafíggindarnir Yasser Arafat, sum leiðari fyri PLO, palestinsku frælsissamtøkuna og Yitzhak Rabin, vegna ísraelsku stjórnina, settu sína undirskrift á eina avtalu um sínámillum viðurkenning. Í avtaluni játtaðu hesir leiðarar at arbeiða víðari fyri friði og fyri at finna eina varandi loysn, so ísraelar og palestinar í framtíðini skuldu kunna liva saman í avtalaðum býti av landslutum. Avtalan, saman við Oslo II avtaluni í 1995, skapti veruliga eina vón. Hóast málið í Oslo-avtalunum ongantíð varð rokkið, so var hetta tað nærmasta, ið nakrantíð er komið, til at finna eina friðarliga loysn millum Ísrael og Palestina. Eitt stríð, sum ávirkar alt miðeystur, ja, meginpartin av heiminum. Eftir hetta hava fleiri av friðarsamráðingunum, sum Noregi hevur gingið á odda fyri, havt betri og varandi úrslit við sær.

Tað ger mun.

Kendi toppfundurin í Reykjavík ímillum Ronald Reagan og Mikhail Gorbatjov er ein onnur serstøk og týdningarmikil hending, ið ofta verður tikin fram, tá tosað verður um leiklutin hjá Norðurlondum í

friðarsamráðingum. Kalda kríggið ímillum Sovjetsamveldið øðrumegin og USA hinumegin hevði verið í drúgva tíð, tá stríðandi partarnir hittust - geografiskt nærum á miðjuni - í Íslandi. Eitt, samanborið við stríðandi partarnar, evarska lítið og uttanveltað land. Hóast Reagan og Gorbatjov ikki undirskrivaðu nakra avtalu har í søguligu húsunum Høfði í Reykjavík, so verður fundurin í oktobur 1986 mettur at vera sera avgerandi fyri ta vápnaavdubbing, sum síðani kom.
Tveir dagar, har tvey heimsveldi hittust í tí pinkulítla landinum, Íslandi, løgdu lunnar undir, at ferð kom á ein enda.

Tað ger mun.

Meðan onnur Norðurlond somuleiðis hava roynt seg sum friðarmeklarar, eisini við góðum úrslitum, kunnu vit spyrja, hvussu hetta ber til? Hvussu ber tað til, at tað hevur eydnast nøkrum av smáu londunum so mikið væl at ført friðarsamráðingar ímillum stríðandi partar, í at síggja til óloysandi stríðum?
Ímeðan tilgongdin hjá norðurlendsku londunum lítla og onga meining gevur, í mun til klassisku fatanina av leiklutinum hjá smátjóðum kontra stórveldum í altjóða politikki, er tað hinvegin greitt, at her eru aðrar snildir tiknar í brúk. Tí okkurt riggar.
Smá lond kunnu illa av álvara seta seg upp ímóti teimum stóru og eru tískil í nógv størri mun uttanveltað. Tey hava í flestu førum ei heldur ein her í eini stødd og styrki, sum megnar at verja landið fyri teimum stóru. Tí bera tey heldur ein leiklut sum lítli brúgvasmiðurin ímillum tey stóru og sterku.

Og so aftur til kjarnuna í tí heila – ein trúgv uppá at tað ber til. Ein trúgv uppá - og ein vilji – til at gera mun, eisini um mann bert er ein lítil dropi í tí stóru mongdini. Dropar kunnu savna stóra rørsluorku, orku, sum munar. Tað er tørvur á hvørjum einasta dropa til at forða teirri vanlukkuligu gongdini, sum heimurin er í í dag.

Hóast ST varð sett á stovn eftir seinna heimsbardaga við tí fremsta máli at fyribyrgja kríggi, so hava tað ongantíð verið fleiri vápnað stríð í heiminum, enn tað eru í dag. Tá kalda kríggið endaði, vóru tað tíverri ósemjur og stríð, sum vundu uppá seg, heldur enn friður.

Granskingarstovnurin IEP, Institute for Economics and Peace, hevur seinastu skjótt 20 árini mett um støðuna í heiminum. Sambært teimum eru í løtuni 56 virkin stríð, har 92 ymisk lond so ella so eru partur. Ein døpur frágreiðing frá fróðskaparsetrinum í Lund í dag sigur somu søgu, og leggur afturat, at fá útlit eru í løtuni til, at hetta broytist í bræði. Heldur enn at brúka orku uppá diplomati og sambond, nýta flestu lond søguliga nógvar pengar uppá vápnadubbing, sum jú eisini er støðan í grannalondum okkara.

Her heima hoyra vit mest um stríðið í Ísrael og Gaza og kríggið millum Russland og Ukraina. Men kríggj eru kring allan knøttin við streymum av flóttafólkum, við hungri og halli í kjalarvørrinum, har kríggj herjar. Og útlit hjá børnum og ungum til eina vónleysa framtíð.
Heimsins friðarligasta land sigst vera Ísland, sum 17. árið á rað hevur ligið á fremsta plássi. Tey, sum gera hesar mátingar, kenna, sum skilst, ikki Føroyar. Men heldur ikki vit sleppa undan at verða ávirkaði, og flestu okkara vilja so fegin finna ein veg at broyta støðuna, um vit kunnu.

**Viknandi fólkaræði**

Einans 25 lond í heiminum verða mett at hava fult fólkaræði. Tað eru um 7% av heimsins borgarum, sum búgva í hesum londum. Harumframt eru 46 lond, ið verða mett at vera sonevnd ófullfíggjað fólkaræði. Tað eru færri enn 40% av heimsins borgarum. Restin av fólkinum í heiminum liva undir sonevndum samansettum stýrum ella undir einaræðis- og valdsstjórnum, sambært Economist Intelligence Units (EIU).

So, fólkaræðið, ið flestu okkara taka fyri givið, er í veruleikanum ein rár skipan í heimshøpi. Tí hevur tað at verja fólkaræðið so óbegrípiliga stóran týdning. At verja fólkaræðið merkir eisini at verja lív. At verja fólksins rødd. At verja rættin hjá fólki og landi til at taka avgerð um egna nútíð og framtíð.

**Væntandi virðing fyri fólkaræðinum**

Tað er trupult at tosa um frið og friðarrørslur uttan at tosa um fólkaræði.
Tíverri gongur afturá við fólkaræðinum. Ja, tað eru tey, ið vilja vera við, at vit seinastu árini hava flutt okkum 50 ár aftur í tíðina. Hví hendir hetta so. Tað eru despotanar, vit síggja og hoyra mest um. Valdmiklar persónar sum Putin, Erodgan, Trump ... setið sjálvi navn á. Men, hesi valdsfólk vildu verið púra valdsleys, vórðu tey ikki umgird av einari skipan og av fólki, ið tryggja teimum valdið. Eg tori at pástanda, at vandamiklasta hóttanin í heimunum er hvørki fátækradømi, hungur ella veðurlagsbroytingar, sum tó eru ræðandi og oyðandi, men tað er trot á góðum demokratiskum leiðarum. Oddamonnum og -kvinnum sum evna at savna, at leiða rætt og rættvíst – og at byggja brýr ímillum seg og mótpartin, ella fíggindan. At laða steinar soleiðis, at tað styrkir fólkaræðið.

Okkum væntar góðar brúgvasmiðir.

Hinvegin síggja vit alt ov mangar leiðarar, hvørs fremsta mál er at styrkja sítt egna vald. Vit síggja forsetar, floksleiðarar og aðrar týðandi leiðarar, umgirða seg við fólki, ið tey eru samd við. Ryggklapparum, ið síggja onnur menniskju, støðurnar í landinum og heimin allan ígjøgnum prismuna hjá hesum leiðara, so veruleikin skapast og umskapast eftir, hvussu glasið er slípað.

Fólk, ið nikka og (skamm)rósa leiðaranum, so hesin kennir seg styrktan í sínari hugsan og støðutakan, hevði nær sagt, uttan mun til, hvussu høpisleysar hesar eru. Vit síggja leiðarar, sum heldur enn veruliga at seta tað besta og mest kompetenta liðið – velja út tey, sum eru til reiðar at tryggja hansara/hennara egna framhaldandi vald. Tey smílast og klappa, tá leiðari trínur á pall. Og hóast vit onnur krimpa tærnar, so vilja tey fara langt fyri at varðveita valdið. Trúskapur lønast við forrættum og sessum. Hetta er sera sjónligt í autoriterum samfeløgum, men tú finnur dømi í øllum londum.

Vald eigur at byggja á fólksins álit og eigur at snúgva seg um at bøta um støðuna hjá fólkinum í landinum, at fremja góð trygdarnet, at skapa frið og at byggja á demokratiskan grundvøll. Valdið fyri valdsins skyld, og leiðarar, ið nøkta vinum sínum, er helst fremsta orsøkin til, at so mong fólk missa álit á skipanirnar, eisini í okkara parti av heiminum. Og viknar álitið á demokratisku skipanirnar í einum landi, er vegurin til korrupsjón, djúpar gjáir og óskipað, ósiviliserað vald, stuttur. At brúka sítt fólkavalda mandat til at styrkja egna støðu, framum at arbeiða fyri fólkið, kemur ikki ókeypis.

**Øll kunnu gera mun**

Men hóast hesi døpru útlit, so er alneyðugt at trúgva uppá felagsskapin, tað góða, møguleikarnar og eina fyri mannaættina bjarta framtíð.
Friðarrørslur kunnu gera mun. Hvør og ein okkara, sum noktar at góðtaka valdið fyri valdsins skyld. Sum brúka okkara rødd til at krevja samskifti heldur enn vápnadubbing. Sum eisini tekur fulla frástøðu frá, at lond leggja onnur lond undir seg – bara tí, at tey eru størri og sterkari og tí kunnu.

Men, sum eisini ger sær ómak at skilja, hvussu samansettar avbjóðingarnar eru, hvussu heimurin sær út, sæddur úr fleiri sjónarhornum. Og sum skilur, at tað als ikki ber til at skapa frið ímillum tveir partar, ger ein sær ikki ómak at skilja báðar.

Fólkið má brúka sína rødd og tora at seta korruptar og sjálvrættvísar leiðarar frá. Tað ber sjálvandi ikki eins væl til í totaliterum samfeløgum, men eisini har finnast djarvar friðarrørslur, sum við vanda fyri lívi og heilsu savna fólk at arbeiða fyri friði og fólkaræði. Tað hava vit sæð fleiri ferðir. Og gerast tey nóg mong, so eydnast ein vakran dag at broyta tað ónda til gott, eisini um tað tekur ættarlið at røkka málinum. Smærri fet gera eisini mun.

**Kunnu Føroyar átak sær ein ítøkiligan leiklut at skapa frið?**

Samstundis sum vit kenna eina alsamt vaksandi polarisering ímillum okkum, hava vit víst í verki, at vit megna at standa lið við lið og fylkjast um eina friðargongu. Vit prógva eisini dagliga fyri heiminum, at hóast vit eru sundurbýtt í loysing og samband, í høgra og vinstra, so er tað við orðum, vit berjast fyri málum okkara – ikki við vápnum.

Tað var ómetaliga vakurt at síggja, hvussu júst friðargongan í fjør megnaði at savna so nógvar partar. At ísraelsk fløgg vórðu borin undir liðini á palestinskum fløggum. Og Merkinum. Øll við einum og sama endamáli - at eggja til og tala fyri friði.

Í Føroyum liva vit eitt friðarligt lív. Vit hava ikki sama ótta, sum so nógv onnur í hesum heimi hava. Sanniliga kunnu bylgjurnar ganga høgt, men sjáldan, um nakrantíð, verður av álvara farið yvirum mørk. Vit eru í nógvum førum samd um at vera ósamd, og virða soleiðis hvønn annan.

Vit hava eina stóra styrki í grundleggjandi virðum okkara, og í tí, at vit ikki eru ein partur av nøkrum vápnaðum stríði. Jú, víst taka vit støðu fyri og ímóti ávísum stríðandi londum, men sum land eru vit ikki partur í kríggi. Vit byggja upp diplomatiskt samstarv við onnur lond, og so við og við virka vit á nógvum altjóða pallum – hóast vit enn ikki eru sjálvstøðugir limir í ST.
Vit kunnu tala røddina hjá friðinum. Vit kunnu vísa okkara andstygd og geva valdsharrum durafjórðingin við okkara gátt. Vit kunnu skjóta upp at vera friðarmeklarar.

Góðu tit,
Tað vóru í gjárkvøldið 80 ár síðani, at Montgomery gav boð um, at týsku herdeildirnar í Hollandi, útnyrðingstýsklandi og Danmark høvdu givið seg yvir. Fáar dagar seinni – hin. 8. mai 1945 – var stóri sigursdagurin í Evropa veruleiki. Kríggið var endað í okkara parti av heiminum, hóast bretsku hermenninir vórðu verandi eina løtu afturat í Føroyum. Síðani eru mong kríggj byrjað, og tey eru ikki so fá, ið spáa, at Putin ikki fer at sættast við Ukraina, men at vápnað stríð millum Russland og onnur lond og øki í Evropa kunnu gerast veruleiki innanfyri fá ár. Tað ER ófrættakent, so tað kennist inn á sálina. Og tað hevur ongantíð havt størri skund at savna fólk og lond kring allan heim í eina friðarrørslu.

Summi velja at gerast pasifistar. At nokta at taka vápn í hond. Summi velja at gera seg til reiðar, at taka vápn í hond, fyri at verja land sítt. Tað, at gera einki, er eisini at gera nakað. Summi halda, at tað einasta rætta er at kvetta øll sambond og samstørv við lond, sum ikki virða altjóða góðkend landamørk. Onnur halda tað vera neyðugt at halda samband, eisini við áleypandi lond, fyri at hava ein dialog - ella bara tí, at tað loysir seg fíggjarliga.
Í kvøld fari eg ikki at gera meg til dómara yvir hesum ella hinum, men, skal ein friðarrørsla gera mun, má hon fevna um eina breiðan hóp av fólki, við ymiskum meiningum, ymsari trúgv, ymiskum hugsanarháttum. Ein rørsla, sum savnar øll tey, sum uttan støðu og stað annars hava málið og viljan til at røkka friði.

At enda vil eg eina løtu minnast Frans páva, sála, sum eg var heppin at hoyra tala í Washington og New York í 2015, og sum hugtók meg við mangan óinnballað at tosa beinleiðis til heimsins harðrendu leiðarar. Hann segði aftur og aftur, at kríggj altíð er ein ósigur fyri mannaættina. At kríggj ongantíð kann rættvísgerast og altíð ber við sær deyða, líðing og oyðilegging. Hann tók frástøðu frá allari religiøsari ekstremismu og segði, at valdsgerðir ongantíð kunnu rættvísgerast í Guds navni. Áhaldandi mælti hann heimsins leiðarum til diplomati, sáttarroynd og seming, ja til at byggja frið.

Trúgv uppá, at tú við tínum dropa kanst gera mun. Og at Føroyar kunnu teljast millum brúgvabyggjararnar.

Tí, tá einstakir valdspersónar kunnu elva til so nógv hatur og so stóra spjaðing, hvussu nógvan kærleika, vón og styrki, kunnu vit tá ikki skapa í felag?

Latið okkum øll bera okkara dropa til at skapa frið í heiminum.

Bjørt Samuelsen,
løgtingsforkvinna